## 2 ára gomul yvirkoyrd

Um trítíðina seinnapartin leygardagin bleiv ein 2 ára gomul smágenta yvirkoyrd á Arjgum. Gentan kom gangandi oman eftir einari brekku við einum leikutoysbili í hondini, tá ein bilur bakkaði út á vegin. Bilførarin hevði ongan møguleika at síggja gentuna, tí hon var so lítil, og endaði hon undir hjólinum á bilinum.

Hetta varnaðist bilførarin og hann fór út at hyggja, hvat var undir hjólinum. Og har lá so hendan smágentan. Bilførarin tordi hvørki at koyra fram ella bakka meira, so tað endaði við, at bilurin varð lyftur av gentuni.

– Vit hava ikki nágreiniliga fingið at vita, hvat fyri skaða gentan fekk, men allarhelst hevur hon brotið lærið, sigur vakthavandi á løgreglustøðini.

**- sae -**

## Bátur stolin

Sunnukvøldið um náttúrðatíð fekk løgreglan fráboðan frá einum bátaeigara, at báturin hansara var stolin. Eigarin greiddi frá, at hann hevði júst sæð bátin hjá sær fara siglandi út um molan við trimum persónum umborð.

Báturin hevði kós móti Eysturoynni, men tá teir nærkaðust Toftum, varnaðust teir løgregluna á keiini, so teir sigldu tvørtur um fjørðin yvir á Strendur. Har vórðu tveir mans settir av. Og síðani ætlaði tann triði sær at sigla aftur til Havnar einsamallur, men tað kláraði hann ikki. Báturin hevði ov lítið av bensini og stegðaði upp.

Maðurin umborð sendi út neyðarkall, tí hann rak móti landi. Vakthavandi sigur, at løgreglan hevði allatíðina eyguni eftir honum frá landi av.

– Vit fingu hann í seinastu løtu, tí tá var hann rikin inn í taran, so tað kundi havt verið nógv verri, sigur vakthavandi.

Allir tríggir menninir vórðu handtiknir og sleppa nú at standa til svars fyri teirra gerð.

**- sae -**

# Ein ógloymandi dagur

**Eitt stórt tiltak var í KÍ høllini fríggjadagin. Øll børnini, sum ganga í Mylnuhúsinum, vórðu saman við teirra familjum í tivoli, sum børnini sjálvi saman við starvsfólkunum, høvdu riggað til og staðið fyri**

TILTAK
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Júst hvussu nógv fólk vóru í tivoli í KÍ høllini fríggjadagin, er ilt at siga. Men tey vóru heilt nógv. Knapt 150 børn ganga til dagligt í Mylnuhúsinum, og um sagt verður, at hvørt barnið hevði tveir gestir, so er skjótt at rokna út, hvussu nógv fólk vóru í høllin hendan dagin.

Hetta var eitt sera stuttligt tiltak, og eigur dagstovnurin bert rós uppiborið fyri at hava givið børnunum ein ógloymandi dag.



*At kasta tallerkar við róma eftir hvørjum øðrum var nakað, sum børnunum dámdi sera væl. Her stendur Hervør fyri skotum*



*Popcornini fullu í góða jør, og her er tað Aksel, sum guffar í seg*




*Stór mannamúgva savnað framman fyri pallinum í Tivoli Mylnuhús fríggjadagin*

### Heimagjørt

KÍ høllin var gjørd um til eitt tivoli, har børnini høvdu sjálvi gjørt meginpartin. Tvær hoppiborgir vóru eisini har, og tær vóru sum vera man vælvitjaðar.

Síðani vóru eisini fleiri básar, har bóltkast, bowling, fiskibrunnur og mangt mangt annað var.

Eisini bar til at kasta tallerkar við róma eftir fólki og vátar svampar, so tað var eitt øgiligt svans í tí eina básinum. Men alt hetta var til miklan stuttleika fyri børn og vaksin. Um børnini raktu persónin, fingu tey ein vinning.

Til bóltkastið høvdu tey sett upp nøkur NAN-blikk, og til bowling høvdu børnini málað nakrar sodavatnsfløskur, sum tey so rullaðu bóltar eftir. Hetta vísti, at tað ber væl til at hava heimagjørt bóltkast og bowling.

Okkurt barnið hevði á orði, at tivoliið hjá Mylnuhúsinum var nógv stuttligar enn tað, sum var á norðoyastevnu.

Eitt langt borð varð sett upp mitt í høllini, har vaksin kundu fáa kaffi ella te og køkur frá bakarínum hjá Símuni afturvið. Eisini var popcorn og saft at fáa, og tað var dúgliga vitjað.

Á pallinum, sum eisini varð settur upp til tiltakið, var ymiskt á skránni. Silvi og Nósi vitajðu, børnini sungu, klovnar komu framvið og Jógvan politiovasti kom eisini at syngja politisangin fyri børnunum, og tey sungu við við lív og sál.



*Fiskibrunnurin var eisini vælvitjaður, og børnini fingu ena sleikisneis hvør, um tað eydnaðist at fanga ein av lutunum í brunninum*

### Familjur

Børnini hildu til í KÍ høllini í tríggjar dagar, og í hesar dagarnar vóru tey býtt upp í familjur í staðin fyri stovur. Hvør familja hevði so eitt navn, til dømis Kinesararnir, Sólskinsbørn og so framvegis. Og so høvdu tey eitt hvørt sermerki, sum vísti til hvørja familju tey hoyrdu.

Hvør familja hevði so eisini sín bás, har tey hoyrdu heima. Men helst mundu tey fyri tað mesta reika runt úti í høllini.

Hóast yvir 100 børn vóru í høllini hesar dagarnar, so siga starvsfólkini, at tað ikki var so strævið, sum tey av fyrstan tíð høvdu væntað.

– Sjálvandi hevur tað verið øgiliga rokaligt til tíðir, men soleiðis eigur tað at vera, tá tað eru so nógv børn. Men hetta hevur verið sera stuttiligt, segði eitt av starvsfólkunum, sum stóð og skar køku.

Tiltakið fríggjadagin vardi góðar tveir tímar, og tað endaði við, at børnini góvu leiðaranum, Honnu Thøgersen eina gávu til minnis um hendan dagin og sum tøkk fyri ein ógloymandi dag. Og aftaná sungu tey slagsangin hjá Mylnuhúsinum, sum er KÍ sangurin Liðið tað eitur KÍ.



**UTTAN ÚR HEIMI**



*Poul Nyrup Rasmussen var tann stóri sigursharrin á danska ES-valinum sunnudagin*

*Mynd: Reuters*

# ES-andstøðan í Danmark deyð

**Danska valið til ES-tingið vísti, at danir nú hava viðurkent, at teir eru partur av Evropasamveldinum. Mótstøðuflokkarnir taptu. Sosialdemokratarnir vunnu. Eins og aðrastaðni tapti tann stóri stjórnarflokkurin eisini**

ES-VAL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tá tað nýmannaða ES-tingið kemur saman til sín fyrsta fund, verða bara tvey andstøðuumboð ímillum tey 14 donsku umboðini í tinginum. Tvey seinastu valini hava flokkarnir og listarnir, sum eru ímóti donskum ES-limaskapi, fingið meiri enn 30 prosent av atkvøðunum, men sunnudagin fingu teir ein frammaná.

– ES-mótstøðan í Danmark er deyð, og ES er vorðið ein partur av donskum politikki, segði formaðurin í Sosialistiska Fólkaflokkinum, Holger K. Nielsen, tá valúrslitið var greitt. Politiskir eygleiðarar í Keypmannahavn eru samdir við honum. Teir halda nógv benda á, at danir nú hava viðurklent, at teir eru partur av ES, og at áralong mótstøða ímóti samveldinum er løgd til viks.

Tann stóri taparin sunnudagin var Juni-rørslan, sum fekk 9,1 prosent av atkvøðunum ímóti 16,1 prosentum á valinum fyri fimm árum síðani. Rørslan misti tvey av sínum umboðum og hevur nú bara Jens Peter Bonde eftir í ES-tinginum. Fólkafylkingin ímóti ES hevði eisini afturgongd, men varðveitt kortini sítt umboð.

### Nyrup vann

Tann stóri vinnarin sunnudagin var fyrrverandi forsætisráðharrin Poul Nyrup Rasmussen, sum var oddavalevni hjá Sosialdemokratunum hesaferð. Flokkurin fekk heili 32,7 prosent av atkvøðunum, og tað var tvær ferðir meiri enn á valinum í 1999. Eingin ivi er um, at tað var Poul Nyrup Rasmussen, sum dró atkvøður til flokkin, og í gjár varð roknað við, at hann fór at seta met í persónligum atkvøðum til eitt ES-val. Sosialdemokratarnir fingu meiri enn 600.000 atkvøður, og hildið varð, at Nyrup mundi hava fingið umleið helmingin ella kanska uppaftur meiri.

Fyrrverandi forsætisráðharrin var samdur við teimum, sum søgdu valið vera eina greiða ábending um, at danir nú hava viðurkent limaskapin í ES.

– Fólkið hevur sagt, at vit hoyra heima í Evropa. Veljararnir hava tikið støðu. Nú er tað ikki ein spurningur, um fólk eru fyri ella ímóti ES. Nú er spurningurin, hvat vit vilja við samveldinum, segði hann, tá valúrslitið var komið.

Eins og í hinum londunum hevði tann stóri stjórnarflokkurin, Vinstri, eitt vánaligt val. Flokkurin fór úr 23,4 niður í 19,4 prosent av atkvøðunum og misti tveir av sínum fimm tinglimum.

### Úrslitið í Danmark

| | 2004 | 1999 | Umb. | 1999 |
|---|---|---|---|---|
| Sosialdemokratarnir | 32,7 | (16,5) | 5 | (3) |
| Radikala Vinstra | 6,4 | (9,1) | 1 | (1) |
| Konservativu | 11,3 | (8,5) | 1 | (1) |
| SF | 8,0 | (7,1) | 1 | (1) |
| Junirørslan | 9,1 | (16,1) | 1 | (3) |
| Fólkafylkingin ím. ES | 5,2 | (7,3) | 1 | (1) |
| Dansk Folkeparti | 6,8 | (5,8) | 1 | (1) |
| Kristil. demokratarnir | 1,3 | (2,0) | 0 | (0) |
| Vinstri | 19,4 | (23,4) | 3 | (5) |

Viðm.: Í 1999 valdu danir 16 umboð í ES-tingið, men nú hevur Danmark bara 14 umboð í tinginum.

## Sinn Fein í ES-tinginum

Fyri fyrstu ferð hevur tann politiski vongurin av Írska Republikanska Herinum fingið umboð í ES-tingið.

Á valinum sunnudagin fekk Sinn Fein næstan 12 prosent av atkvøðunum. Tað var næstan tvær ferðir meiri enn á valinum fyri fimm árum síðani, og tað var eisini nóg mikið til at geva flokkinum tvey umboð í ES-tingið.

Eins og í øðrum londum royndist valið í Írlandi illa hjá stjórnini. Flokkurin hjá Bertie Ahern, forsætisráðharra, Fianna Fail, hevði eitt vánaligt val og misti tvey av sínum umboðum í ES-tinginum.

## Latast leysur ella ákærast

Altjóða Reyði Krossur krevur nú, at fyrrverandi irakski einaræðisharrin Saddam Hussein verður ákærdur ella latin leysur.

Talskvinnan hjá Reyða Krossi, Nada Dourmani, segði við bretska blaðið The Guardian í gjár, at amerikonsku myndugleikarnir siga Saddam Hussein vara krígsfanga, og tí noyðast teir annaðhvørt at draga hann fyri rættin ella at lata hann leysan, tá hersetingin heldur uppat tann 30. juni. Gera teir ikki tað, brýtur USA fólkarættin, segði Nada Dourmani.

Reyði Krossur sigur, at amerikanararnir hava einar 40 fyrrverandi irakskar politikarar sitandi í fangalegum, uttan at nakar teirra er ákærdur. Sagt verður, at fangarnir sleppa ikki at tosa við sakførarar ella síni næstu, men at teir verða javnan avhoyrdir. Reyði Krossur heldur, at USA ætlar sær at revsa fangarnar uttan at vita, um teir yvirhøvur eru sekir í nøkrum lógarbroti.

## Danskir pengar truplir

Tað loysir seg ikki hjá dønum at hava danskar pengar við sær, tá teir fara uttanlands at ferðast.

Jyllandsposturin skrivar, at fleiri bankar í Týsklandi og Fraklandi sýta fyri at veksla danskar pengar, og í øðrum londum vilja bankarnir hava rættiliga stóra samsýning fyri at veksla danskar pengaseðlar. Ein kanning, sum Amagerbanken hevur gjørt, vísir, at tað loysir seg betur at veksla pengarnar, áðrenn farið verður avstað.

Í Amagerbankanum verður sagt, at bankarnir í evrulondunum eru ikki serliga fegnir um at veksla danskar, norskar og svenskar krónur ella bretsk pund. Hesi gjaldoyru eru uttan fyri evrusamstarvið og verða tí roknað sum ein trupulleiki, sigur bankin eftir at hava kannað viðurskiftini í 23 londum í ES.

## Fáa milliónir fyri at flyta

Ísraelska stjórnin hevur boðið teimum jødisku niðursetufólkunum í Gaza-geiranum nógvar pengar, vilja tey flyta haðani.

Aftenposten veit at siga, at stjórnin er til reiðar at rinda hvørjum húski meiri enn næstan tvær milliónir krónur, vilja tey flyta til Ísraels. Taka øll niðursetufólkini av tilboðnum, fer flytingin at kosta ísraelska ríkiskassanum einar fimm milliardir krónur. Sambært Aftenposten hava summi valt at taka av, men fleiri vilja ikki hoyra talan um at flyta.

Ísraelska stjórnin hevur samtykt at taka herin úr Gaza-geiranum og at flyta fólkið í niðursetubygdunum burtur haðani. Sambært samtyktini fara teir seinastu hermenninir úr geiranum innan 1. oktober, og til ta tíð skulu øll niðursetufólkini í teimum 21 bygdunum eisini vera farin haðani.